Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# ATLI Pæturssonur DAM

## in memoriam

Hugstoytt og sera sárt er at skulla siga heilhjartaðum studentavini og idealistiskum partamanni farvæl fyri síðstu ferð. Vit hava kenst í næstan hálva øld – vit hava prátað saman, skemtað, og ofta vitjað hvønnannan, hóast stóra geografiska distancu! Nú Atli ikki er meira, – eri eg so forharmaður, at orð kunnu ikki siga frá tí!

Tíðliga fyrrapartin sjeynda februar tosaðu vit eina góða løtu í telefon, sum vit javnliga plagdu, og fyrst og fremst skiftu vit orð um tað *brandaktuella* fólkatingsvalið, sum skuldi vera dagin eftir. Hann var væl hýrdur, fullur av stríðshuga, men avbera spentur og kanska eitt lítið sindur stúrin um, hvussu valúrslitið fór at verða – hann fregnaðist nógv um donsku valorrustuna og harmaðist um døpru útlitini hjá danska brøðraflokkinum. Men so herdi hann seg í huganum og fortaldi, hvussu aktivt hann sjálvur eggjaði tí yngra javnaðarliðinum og agiteraði gjøgnum telefon, helst tí hann intuitivt grunaði, at mobiliseringin ikki var nóg effektiv!

Hann kundi ikki vera óheftur eygleiðari av valdysti, men mátti luttaka og brynja seg – ein <u>so</u> sterkur og <u>so</u> eldhugaður solidaritetur er treytaður av nógvum adrenalini! Tað er væl hugsandi, at tað hevur staðið so nógv á honum, at hann mentalt hevur overvað seg!

Ið hvussu er og ikki – minni enn tíma eftir okkara samrøðu, havi eg seinni frætt, mátti hann fara á sjúkrahúsið og kom ikki heimaftur á lívi!

Tað varð ofta tikið til um pápa Atla, Petur Mohr Dam, at hann var homo *politicus burturav.* Tað mest politiska menniskja, Føroyar hava fostrað! Men júst tí, at pápin stórt sæð livdi og doyði fyri politikki, fekk Atli frá barnsbeini ta mest systematisku politisku uppaling, sum nakar føroyingur hevur fingið! Tessvegna var heldur eingin, sum var betri fyrireikaður til eina politiska karrieru enn hann.

Kortini helt hann gerandisdagin í uppvøkstrinum vera mest sum <u>*ov*</u> politiskan viðhvørt. Hann hevur sjálvur fortalt, at tað ikki var heilt sørt av eskapismu í, at hann valdi *polyt* – framum *politlesnaðin*!



### Frá Herlufsholm til Falkonércentrið

<u>*Oh alte Burschenherrlichkeit*</u>
<u>*Wohin bist du entschwunden?*</u>

Atli tók matematiskt studentsprógv í 1952 frá Danmarkar avgjørt besta gymnasium, tí heiðurskrýnda kostskúlanum, *Herlufsholm*, sum var settur á stovn 1566 av hjúnunum *Herluf Trolle* og *Birgittu Gøye* í einum fyrrverandi benediktinarakleystri, sum tey høvdu makaskift við kongin, *Fríðrikk Annan.* Allarelstu partar av teimum hábærsligu miðaldarbygningunum eru frá 12. øld. Hjúnini vóru av mætum aðalsfólki, men barnleys. Hann var ríkisadmiralur og Birgitta var sera ognarrík og hartil mentað kvinna, sum hevði stóran áhuga fyri undirvísing og upplýsningi. Tey gjørdu av, at tey vildu geva góðs og garð til ein lærdan skúla fyri <u>*„menige ædlingers og andre menige mænds børn i Danmarks rige".*</u>

Tey trý árini hjá Atla í hesum søguliga umhvørvi og stak vakra landslagi í tí saftiga suðursælendska feitilendinum við Næstved vóru spennandi, fruktagóð og andiliga mennandi. Hann tosaði ofta og sera fegin um ta avbera stimbrandi og stuttligu gymnasiutíðina. Serliga væl dámdi honum tær føgru og villu skógirnar nærhendis tí romantisku Súsánni, sum rennur tætt fram við skúlanum.

Lærararnar helt hann vera framúrskarandi – tað vóru menn, sum gloppaðu ungdómi dyrnar til klassiskt dannilsi og kontemplativt erkennilsi eftir Goethe-uppskrivt. Orðið *kontemplativt* brúkti Atli sjálvur ofta um sítt lívssýni! Næmingarnir harafturímóti drógu ikki beinleiðis somu línu sum Atli. Teir vóru flestallir ríkmannasynir frá donsku yvirstættini og alt annað enn javnaðarmenn. Atli hevði kortini samband við nógvar av hesum monnum alt lívið. Seinast teir hittust var fyri góðum tveimum árum síðani *(summarið 2002)*, tá ið klassin hevði 50 ára studentagildi.

Tað er eingin loyna, at eitt danskt studentsprógv gevur víðari sjónarring og munandi størri intellektuelt viðføri enn eitt føroyskt prógv. Tað vardi altíð eina tíð, áðrenn „heimføðingar" av VBV komu á niveau við teir, sum høvdu fingið danskt *artium*. Atli skuldi ikki akklimatiserast til *Burschenleben* – hann var longu scenuvandur og í orðsins besta týdningi millum allarkátastu og mest mentaðu synir Minervu. Hann gjørdist aldri hvørki heimføðisligur nationalistur ella bornertur smáborgari – var tvørturímóti víðskygdur heimsborgari.

Danska partablaðið *Socialdemokraten* hevði samrøðu við hann longu tíðliga í 50 unum, tá ið hann sum blaðungur studentur gjørdi politiskt vart við seg á kongress (landsfundi) hjá danska javnaðarflokkinum, har hann umboðaði føroyskar javnaðarmenn. Hann kendi fleiri av donsku oddamonnunum frammanundan, eitt nú Viggo Kampmann, sum var vinmaður Petur Mohr Dams, men í so frálíkum politiskum umhvørvi fekk hann persónligt samband við nógvar aðrar og seinni leiðandi socialdemokratar, so sum H.C. Hansen, Erhard Jacobsen, Jens Otto Krag, K.B. Andersen og studentajavnaldran Knud Heinesen. Teir tríggir síðstnevndu royndust honum, sum frá leið av allarbestu persónligu vinmonnum – Atli var ein heilan mansaldur javnligur gestur á landsfundi hjá donskum javnaðarmonnum, oftast í Falkonércentrinum, og hann treivst einastandandi væl millum hesar mentaðu hugsjónarmenn!

### Burschenschaft

<u>*Nie kehrst du wieder goldne Zeit*</u>
<u>*So froh und ungebunden*</u>

Atli og Ása hittust í studentatíðini og giftust longu miðskeiðis í 50 unum. Tað er ikki øllum givið at kunna syfta ta truplu fusiónina millum tað óbundna studentalívið og tað borgarliga hjúnabandið, og tá í tíðini var tað *heilt* sjáldsamt.. Men tey bæði tóktust leingi at hava funnið eina skilagóða pragmatiska symbiosu millum tvinnar krevjandi kulturar.

Tað fjølbroytta studentalívið í 50 unum var als ikki berur romantikkur, heldur var tað spartanskur og fátæksligur gerandisdagur, – lestrarveiting, so sum SU, fanst næstan ikki – tí máttu tey flestu arbeiða afturvið lesnað-